# NSÍ vendi kapp

**VODAFONEDEILDIN** Tá fjórða umfar var liðugt lá NSÍ niðast við einum stigi, meðan B36 lá ovast við tíggju stigum. Tíggju umfør seinni liggur NSÍ á fyrsta plássi og megnaði milum annað at vinna níggju dystir á rað. B36 misti stevið og liggur á einum fimta plássi, átta stig aftanfyri NSÍ. ÍF hevur klára seg væl higartil og liggur á einum flottum triðja plássi. Teir hava eisini bókað sær eitt pláss í steypafinalui.

Tróndur Arge

B36, Víkingur og B68 hava ikki megnað at liva upp til ambitiónirnar. B36 byrjaði væl, men megnaði ikki at toki koyrandi og eru nú á einum fimta plássi. Víkingur vann í fjør steypakappingina og bronsu, men í ár verður tað møkuliga til hvørki. Taptu fyri ÍF í hálvlfinluni í steypakappingini og eru sjey stig frá triðja plássinum. B68 byrjaði við at hólva B71 av, men síðani lítið verið at sæð til tað B68 liðið.

Í botninum er B71 komi best frá uppgávuni sum uppflytari, men tapið fyri FC Suðuroy á Jóansøku gera at tað er samband millum B71 og hini bæði botnliðini, AB og FC Suðuroy.

## NSÍ

Teir kundu nærmast ikki fáa eina verri byrjan. Eftir fýra umfør var bara eitt stig komi í hús og tað sá svart út í Runavík. Í fimta umfari komu so argjamenn á vitjan og tað var byrjanin til eina sigursrøð uppá heilar níggju dystir. Har ímillum ein 3-0 sigur á Toftum, ein 5-1 sigur í Gundadali í móti B36 og ein 2-0 sigur í oddabrakinum ímóti HB á eystanstevnu. Stóri leikarin hjá NSÍ hevur verið liðskiparin, Christian Høgni Jacobsen. Hann hevur ferð aftaná ferð verið avgerandi munurin tá NSÍ hevur sigrað. Hann er eisini langt fremst á toppskorara listanum við 12 málum, sum er tvífalt so nógv sum teir næstu á listanum.

## HB

HB byrjaði árið við nýggjum venjara og fleiri nýggjum leikarum. Teir fingu ikki eina lætta byrjan, tí fyrst B36 í vegin í steypakappingini og síðani komu uppflytarnir úr Suðri til havnar og mundu tikið øll stigini við Smyril suður aftur. Síðani kom gongd á HB, sum legði seg á fyrsta plássi við einum Fróða Benjaminsen sum stýrimanni. Stóar nýggja navni í føroyskum fótbólti í ár er Símun Samuelsen, sum er komin heim úr íslendskum fótbólti. Hann hevur saman við Fróða Benjaminsen spælt flest minuttir fyri HB higartil.

## ÍF

ÍF er eitt av liðnum, sum hevur staðið seg betri enn væntað. Teir spældu seg í steypafinaluna við at vinna 3-0 í Gøtu ímóti Víkingi og hava higartil skavað heili 25 stig saman á triðja plássi. ÍF er í nógvar mátar eitt sindur ringt at rokna út. Til tíðir spæla teir sum eitt oddalið, ið veruliga kann bjóða av í oddinum. Tað vísa millum annað sigarnir á HB og Víking og ikki minst gongdin í steypakappingini. Men so eru tað eisini dystirnir, tá ÍF spælir sum eitt lið, ið ikki hoyrir heima í oddinum. Millum annað 5-0 tapið fyri B36 og ikki minst 4-4 javnleikurin leygarkvøldið ímóti AB.

## EB/Streymur

Eftir seks umfør hevði EB/Streymur bara fimm stig og var eitt av vónbrotinum í Vodafonedeildini. Síðani kom EB/Streymur í ein góðan stima og vunnu fimm og spældu tveir javnar. Í seinasta umfarinum fyri summarferiuna, hevði EB/Streymur ein møguleika at av álvara blanda seg uppí oddastríðið, men tapti greitt fyri HB í Gundadali. EB/Streymur er steypaliðið í Føroyum fyri tíðina. Fjorða árið á rað eru teir í steypafinaluni, sum verður á Summarfestivalinum í Klaksvík.

## B36

B36 hevði í fjør eitt vánaligt kappingar ár, men teir megnaðu í harðari kapping við KÍ, at tryggja sær sæti í bestudeildini. Í ár skuldu aðrir bollar í suppuna og Sigfríður Clementsen var settur sum venjari. Til gongdin taldi millum annað Hjalgrím Elttør, Bárður Olsen og Dmitrjie Jankovic. Tað byrjaði við trimum sigrum, men síðani megnaði B36 ikki at vinna fyrr enn í 13. umfari, tá AB var á vitjan í Gundadali. B36 fór í summarferiu við einum knúsandi 5-0 sigri á ÍF og einum fimta plássi. Fleiri vilja verða við, at B36 manglar ein framherja, teir hava nú tryggja sær Stig-Roar Søbstad úr AB. Er hann prikkurin, sum manglar í B36 puslispælinum?

## Víkingur

Víkingur vann í fjør Løgmanssteypið og bronsu í landskappingini. Tí var væntað, at Víkingur fór




*Stóri profilurin í landskappingini higartil hevur verið NSÍ liðskiparin, Christian Høgni Jacobsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*